gult12 cyan12 magenta12 svart12



# Málið er nýggjur oljulandslutur á Atlantsmótinum

**Hann er sera bjartskygdur um útlitini fyri eini oljuvinnu á okkara leiðum. Hansara aðalmál er at kunna menna ein heilt nýggjan oljulandslut á Atlantsmótinum. Tí heldur hann tað er umráðandi at hava allar møguleikar opnar. Men hann ætlar sær ikki at fremja nakað, sum gongur ímóti ynskjunum og tørvinum hjá føroyingum. Einki skal verða tvingað niður yvir høvdið á nøkrum. Allur útviklingur og menning av eini oljuvinnu á hesum leiðum skal vera í besta forstáilsi millum bæði vinnu og myndugleikar í Føroyum og Bretlandi. Hetta er stavnhaldið hjá Peter Rattey, sum stendur á odda fyri leiting og framleiðslu hjá BP við Føroyar og Hetland.**

OLJA OG ATLANTSMÓTIÐ
*Jan Müller*

Hvussu fer framtíðin at síggja út á Atlantsmótinum, um fleiri av oljufeløgunum, sum í ár og næsta ár fara at bora, finna nógva olju her! Og hvussu fara oljufeløgini at byggja út oljufelt í hesum nýggja økinum! Og hvønn týdning kann ein heilt nýggjur oljulandslutur millum Føroyar og Hetland fáa fyri økið. Hetta og annað spurdu vit stjóran hjá BP á Atlantsmótinum, Peter Rattey.

Peter Rattey, sum hevur drúgvar royndir í oljuvinnuni, og nú stendur á odda fyri tí leiting, sum skal fara fram bæði á føroyskum og bretsku økinum nærhendis markið, dámar væl at spæla sær við hugskotum, hvussu framtíðin kann fara at síggja út. Sjálvur er hann sera bjartskygdur um útlitini fyri eini oljuvinnu á okkara leiðum. Hansara aðalmál er at kunna menna eina heilt nýggja oljuprovins á Atlantsmótinum. Tí heldur hann tað er umráðandi at hava allar møguleikar opnar. Men hann ætlar sær ikki at fremja nakað, sum gongur ímóti ynskjunum og tørvinum hjá oyggjabúgvunum á Atlantsmótinum. Einki skal verða tvingað niður yvir høvdið á nøkrum. Allur útviklingur og menning av eini oljuvinnu á hesum leiðum skal vera í besta forstáilsi millum bæði vinnu og myndugleikar í Føroyum og Bretlandi.

Peter Rattey hevur eisini sínar metingar um, hvussu møgulig oljufelt á Atlantsmótinum best kunnu byggjast út. Nú BP hevur fingið tillutað eitt nýtt leitiloyvi í Hvíta økinum bretskumegin markið og frammanundan hevur fingið ein góðan lisens á føroyska landgrunninum, hevur felagið í umbúnað at bora á báðum loyvum í heyst. BP metir góðar møguleikar at finna olju og skuldi tað hent, at rakt verður við olju bæði á føroyskum og bretskum øki í ár, so er tað ætlanin at byggja út bæði feltini um somu tíð. Tað vil betra lønsemið munandi, tí tað kann vera grundarlag undir at byggja upp ein infrastruktur í økinum báðumegin markið. Peter Rattey sipar her til eina rørleiðingsskipan, sum síðani hevur samband við landmantin Føroyar ella Hetland. Tað merkir so aftur, at tað slepst undan at brúka FPSO-loysnina, har neyðugt er við fleiri framleiðsluskipum til tey ymsu feltini.

## Pallar heldur enn skip

BP sær helst, at brúktir verða framleiðslupallar heldur enn framleiðsluskip á Atlantsmótinum í framtíðini, og tess størri felt tú finnur tess lættari er eisini at arbeiða frá yvirflatuni enn at skula arbeiða á havbotninum. Foinaven og Schiehallion feltini vestan fyri Hetland eru sokallað "subsee" tvs. at stórur partur av útbúnaðin er á havbotninum og verður oljan pumpað umborð á framleiðslu- og goymsluskip (FPSO). Við hesi loysnini fær tú bert 35% upp úr goymslunum (recovery). Tá øll henda útgerðin ístaðin fyri er á havyvirflatuni tvs. umborð á einum palli, so ber til at økja útbýtið munandi, ja so nógv sum at fáa meira enn 70% av oljuni upp. Tvs. at tú kanst fáa meira enn helvtina so nógv av olju úr goymslunum tá pallar verða brúktir heldur enn framleiðsluskip við útgerð á havbotninum. Men fortreytin fyri eini slíkari loysn er so ein rørleiðingsskipan, haðani tú kanst flyta bæði olju og gass frá feltunum á Atlantsmótinum til lands. Tú sleppur tá undan at hava skip at flyta oljuna til lands við. Samanumtikið kann ein slík loysn verða nógv bíligari enn verandi loysnir á Foinaven og Schiehallion feltunum. Tað fer so at minka um útreiðslurnar av framtíðar leiting og útbygging, og tað vil so aftur hava við sær, at smærri keldur verða meira áhugaverdar og lønandi.

– Kunnu tit so fáa varandi pallloysnir á havinum heldur enn framleiðsluskip og útbúnað á havbotninum merkir tað, at ístaðin fyri at fara eftir feltum uppá 400 mill. tunnur vil tað í framtíðini verða lønandi at fara eftir nógv minni feltum. Tað kann í síðsta enda bera í sær eitt nýtt norðsjóvarævintýr.

Peter Rattey viðgongur, at basaltið enn er ein trupulleiki skal man ímynda sær leiting og útbygging longur inni á landgrunninum. - Vit vita ikki um olja er undir basaltinum, men møguleika er fyri, at grótsløgini har eru tey somu sum tey vit nú fara eftir.

## Basaltið

Vit spurdu Peter Rattey um tað ikki hevði verið frætt av føroysku myndugleikunum longu í 1. útbjóðing at kravt av oljufeløgunum, at tey eisini høvdu onkra boring á basaltinum!

– Tað kundi kanska sæð soleiðis út. Men um ein slík boring var miseydnað m.a. tí at man ikki heilt veit, hvat man skal fara eftir, so hevði tað gjørt, at áhugin fyri at bora har seinni, hevði verið lítil. -Um tú bara borar við bindi fyri eyguni og brúkar einar 250 mill. kr. til slíka boring og einki fær burtur úr, so bakkar vinnan út. Tí haldi eg tað er betri at brúka boripengarnar at leita, har tú hevur nakað at fara eftir.

Talan er annars um rættiliga stórar upphæddir at bora á okkara leiðum. At bora Svínoy-kelduna kostar BP 160-170 mill. kr. Arbeiðið hjá Føroyabólkinum hjá BP kostar annars einar 70 mill. kr. um árið. Tvs. at útreiðslurnar hjá BP at fyrireika og bora sín fyrsta brunn við Føroyar fara at liggja millum 230 og 250 mill. kr.

– Vit royna at halda alt tað vit brúka áðrenn vit finna olju (findingcost) undir ein dollara uppá tunnuna. Vit leita tí eftir einum felti uppá 500 mill. tunnur.

Peter Rattey sær nógvar møguleikar fyri føroyingar verður ein stór oljuútbygging á Atlantsmótinum. Verða fleiri oljufelt funnin og útviklað á føroyskum og bretskum øki kann tað í framtíðini koma uppá tal at veita hesum feltum vørur og tænastur úr Føroyum tvs. at tað kann væl blíva ein føroysk útgerðarhavn, sum verður veitari til bæði Foinaven og Schiehallion og onnur felt nærhendis. Tað setur aftur hægri krøv til útgerðarhavnir og lokalar veitarar. Men tað ber so eisini til, um føroyingar ikki ynskja, at hesin útviklingurin skal vera úr Føroyum, at hann so verður úr Skotlandi og at føroyingar tá eisini kunnu arbeiða í Skotlandi.




*Nógv bendir á, at tað verður nógv virksemi á Atlantsmótinum næstu árini. 15 leitibrunnar skulu borast báðumegin markið, 8 á føroyskum og 7 á bretskum øki. Haraftrat eru oljufeløg farin undir at leggja rørleiðing til gassflutning frá Foinaven og Schiehallion til Sullom Voe og víðari til Magnus eystan fyri Hetland. Í næstum verður avgerð tikin, um farast skal undir útbygging av stóra oljufeltinum Clair.*



*BP-stjóra dámar betri eina pallloysn – tengd saman við eini rørleiðingsskipan – fyri framleiðslu á Atlantsmótinum enn eina skipan við flótandi framleiðsluskipum (FPSO). Mynd er frá norska Vargfeltinum.*

gult13 cyan13 magenta13 svart13

ítróttur
Nr. 96 • týsdagur • 22. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo



**GÍ fer upp frá**

Síða 22-23

# Jákup er arbeiðsleysur

**Tað er rættuliga sannlíkt, at landsliðsmálverjin hevur spælt sín síðsta dyst í Herfølge, og nú bendir nógv á, at hann fer at flyta aftur til Føroya**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*



*Árið í ár hevur ikki á nakran hátt mint um sigursgongdina í fjør hjá Herfølge, og nú tykjast útlit vera fyri, at Jákup Mikkelsen er vorðin arbeiðsleysur í fótbóltshøpi*

Jákup Mikkelsen er arbeiðsleysur. Sáttmálaskeiðið hjá honum og Herfølge er runnið 30. juni, og í løtuni eru ongar ábendingar um, at føroyski landsliðsmálverjin fer at flyta til nakað annað útlendskt felag. Tað er eisini nógv, sum bendir á, at Jákup Mikkelsen hevur spælt sín siðsta dyst fyri Herfølge.

– Vit eru ikki fluttir niður enn, men tað er bara á teoretiska støðinum, at tað kann ímyndast, at vit sleppa undan niðurflytingini, sigur Jákup Mikkelsen.

Tað eru trý umfør eftir í superliguni, og tað kann væl hugsast, at John Faxe Jensen fer at geva einum øðrum málverja plássið ímillum stólparnar í teimum seinastu dystunum.

– Faxe og eg hava tosað um tingini. Hann hevur sagt mær, at so leingi, sum tað var vón fyri, at vit kundu sleppa undan niðurflyting, so fór hann at hava meg í málinum. Hann legði afturat, at um tað kom har til, at Herfølge var flutt niður, áðrenn kappingin var liðug, so fór hann at seta ein nýggjan málverja við. Nú er tað komið har til, ella tað er í hvussu so er heilt tætt við, heldur Jákup Mikkelsen, sum tískil ikki verður bilsin, um hann ikki fær boð til landskappingardystin komandi sunnudag.

## Eingin áhugi

Jákup Mikkelsen hevur seinastu tvey árini verið mettur sum ein hin besti málverjin í superliguni. Tær seinastu vikurnar hevur tað ikki gingið serliga væl. Mistøk hjá málverjum kosta altíð nógv, og onkur sovorðin hava verið at sæð.

Sunnudagin tapti Herfølge 2–1 á heimavølli ímóti AaB, og tað hevði lítið við rættvísi at gera. Í 1. hálvleiki hevði Herfølge nógv meiri spæl enn gestirnir, og teir høvdu fleiri málmøguleikar, men teir fingu ikki mál.

Donsku fjølmiðlarnir halda, at Herfølge málverjin var óheppin í sambandi við fyrra málið. Talan var um eitt ikki serliga harðligt langskot. Jákup fekk fingrarnar á, men bólturin datt á tvørtræið og niður í vøllin skeivu megin málstrikuna:

– Eg skuldi havt vippað bóltin upp um málið og til horna. Tað er einki yvir at dylja, at tað ikki hevur gingið so væl tær seinastu vikurnar, sum eg fegin hevði viljað havt tað at gingið. Eg haldi sjálvur, at tað hevur ávirkað avrikini hjá mær, at framtíðin hevur verið so ótrygg, sigur Jákup Mikkelsen.

Tað hevur síðani eina ferð í vetur ljóðað, at FCK var áhugað í at knýta føroyska málverjan at sær. Men Jákup Mikkelsen sigur, at tað er greitt, at einki verður burturúr nøkrum sáttmála ímillum FCK og hann, og Jákup veit heldur ikki um nakran annan møguleika fyri sáttmála:

– Herfølge ynski eg ikki at halda fram í. Har haldi eg ikki, at eg havi nakrar avbjóðingar eftir. Mær hevði dámt at roynt fótbóltslívið í útlandinum í nøkur ár afturat, men í løtuni veit eg ikki um nakran annan møguleika. Tí bendir nógv á, at vit fara at flyta heim til Føroya í summar, sigur Jákup Mikkelsen.

Jákup Mikkelsen vil ikki gera viðmerkingar til tað, men tað hevur ljóðað fyrr í ár, at onnur feløg enn FCK hava verið áhugað í føroyska málverjanum. Tað kann væl hugsast, at sambandið ella samskiftið við FCK hevur gjørt, at Jákup ikki hevur verið serliga áhugaður í at samráðast við onnur feløg. FCK leigaði í vetur norska málverjan Thomas Myhre úr Everton. Tað segðist, at teir tóku hetta stigið, tí Herfølge var ikki sinnað at selja Jákup Mikkelsen til FCK.

Thomas Myhre hevur staðið seg sera væl aftan fyri stórspælandi verjuna hjá FCK, og tí er FCK áhugað at leingja samstarvið við norska málverjan.

# Jónleif skal venja Kyndil

**Alt fleiri av hondbóltsfeløgunum hava nú loyst venjaraspurningin til komandi kappingarárið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Meðan fótbóltsfeløgini stríðast á vøllinum, er tíðin hjá hondbóltsfeløgunum at brynja seg til komandi kappingarár, og fyri summi av hesum er longu komið á mál.

Millum annað er longu greitt, at Páll Poulsen komandi ár skal venja menninar hjá VÍF, meðan Sophus Dal-Christiansen skal venja neistakvinnurnar, eftir at hann í fjør vandi menninar hjá Kyndli.

Kyndil stendur tó á ongan hátt uttan venjara til menninar. Jónleif Sólsker, sum í fjør aftur leikti við Kyndli, verður komandi kappingarárið venjari hjá mansliðnum, og sjálvur heldur hann, at talan er um eina spennandi avbjóðing.

Jónleif sigur annars um komandi árið, at talan helst verður um á leið sama fólkið, sum í fjør var við til at vinna bronsumerki til Kyndil. Einasta ivamalið tykist vera málverjin, tí Jens á Skipagøtu undir ongum umstøðum tykist verða tøkur alt kappingarárið, tá hann skal av landinum í lestrarørindum.

Sjálvur ætlar Jónleif sær ikki at spæla í fyrsta umfari, men hann ætlar sær tó at vera tøkur, um so er, at tørvur er á honum.

Sáttmálin millum Kyndil og Jónleif Sólsker er fyrsta umfari settur at umfata eitt kappingarár.

Annars stendur at lesa á heimasíðuni hjá Kyndli, at Rógvi Nielsen komandi árið skal venja kvinnuliðið hjá felagnum, men sum vit hava skilt, kennist Rógvi sjálvur ikki við hesi tíðindi.




*Jónleif Sólsker verður aftur ein partur av Kyndilsliðnum í ár, men hesa ferð sum venjari*